# Maersk Air arbeiðir óseriøst

*Tilboðið, sum Maersk Air kom við um bíligar ferðaseðlar til Danmarkar, er óseriøst, tí talan er um beinleiðis prísdumping, sigur stjórin í Atlantsflog, sum er ørkymlaður og tykist eitt sindur tikin á bóli av Maersk Air*



EDVARD JOENSEN

Talan er um beinleiðis prísdumping, tá Maersk Air nú fer at lækka prísirnar so nógv, uttan at tosað hevur verið um tað frammanundan, sum annars hevur verið vanligur príspolitikkur, sigur stjórin á Atlantsflog, Magni Arge í viðmerking til tilboðið, Maersk Air legði fram á tíðindafundi mikudagin.

Magni Arge sigur, at teir prísirnir, Maersk Air nú bjóðar fram, standa ikki mát við tað, flúgvingin veruliga kostar. Og hann er sannførdur um, at hetta er ein máti at trýsta tann fátækara kappingarneytan, Atlantsflog, fíggjarliga. Tí tað er eingin ivi um, at skal kappast upp á handan mátan, verður tað tann djypri lummin, sum fer at vinna. Og tá so annar liggur eftirá, fara prísirnir aftur upp loft, og so er einki vunnið hjá tí, sum ferðast skal.

Tað kann tykjast freistandi hjá fólki at taka undir við hasum nú. Tey fáa bíligar ferðaseðlar, meðan hetta blóðbaðið stendur uppá, sigur Magni Arge. Men so skjótt annað felagið - og tað verður Atlantsflog - er givið, eru hasi tilboðini eisini horvin, sigur hann.

Magni Arge heldur ikki, at vit eiga at lata fríu marknaðarkreftirnar laga prísirnar á Føroyarutuni, tá vit tosa um flúgving. Hann vísir á, at um Maersk endiliga vildi lækka sínar prísir, kundu teir bara gjørt tað, meðan teir vóru einsamallir.

Væl er eingin ógvuslig príslækking hend, síðan Atlantsflog fór at flúgva. Men har eru komnar so nógvar aðrar tænastur, sum ikki vóru, sigur Magni Arge og vísir á, at talið á fráferðum er vaksið helt munandi, eins og stabiliteturin á rutuni er øktur øgiligt, síðan Atlantsflog fór á flog.

Hann vil als ikki inn á at samanbera fría kapping í luftini við ta kappingina, sum var á sjónum, tá Smyril Line tók dystin upp við DFDS. Tað vísir hann bara frá sær. Men hann sigur tó, at skal frí prískapping vera um flúgvingina upp á Føroyar, má eisini vera frítt hjá feløgum uttan fyri ES at flúgva í ES. Og tann møguleikin er ikki, sigur Magni Arge.

Hann heldur tað vera beinleiðis harraboð úr Danmark, at Maersk Air skal royna at trýsta Føroya Landsstýri at geva lovyi at dumpa ferðaseðlaprísin við tveimum daga skotbrái. Hann vónar, at landsstýrismaðurin fer at hyggja at, hvat loysir seg í dag ,og hvat fer at loysa seg í framtíðini.

Tað má ikki verða so, at landsstýrismaðurin fer at geva Maersk Air loyvi at flúgva fyri løtuvinning hjá ferðafólkunum í dag. Tí tað fer avgjørt at koma teimum aftur um brekku, tá bert eitt felag verður eftir, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog.

- Nú má landsstýrismaðurin finna út av, um hann vil hava karráða kapitalismu at virka á Føroyarutuni, ella hann fer at hyggja at, hvat gagnar føroyskum áhugamálum best, sigur stjórin á Atlantsflog.

Magni Arge sigur, at hann er heldur ørkymlaður av teimum signalum, Maersk Air sendir út við hesum tilboðnum. Men hann hevur einki í hettuni, sum setast kann upp ímóti. Tað er als ikki viðgjørt. Men nevndarfundur verður í dag, og tá verður málið uttan iva tikið upp.

Roynt varð at fáa eina viðmerking frá Finnboga Arge, landsstýrismanni í vinnumálum, men tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, var á veg aftur til Danmarkar, tá roynt varð at fáa orð á hann, beint áðrenn blaðið fór til prentingar, so tað eydnaðist heldur ikki.



*– Teir prísirnir, Maersk Air nú bjóðar fram, standa ikki mát við tað, flúgvingin veruliga kostar, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog*


Drúgvur leygardagur á Bilfríðkan

Vit hava opið leygardagin frá kl. 09.00-17.00.
Stórt úrval av nýggjum og brúktum dieselbilum



Verið vælkomin til eitt bilprát

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn • Tel. 31 73 00 ella 21 73 00

Lagalig fígging til brúktar bilar

Sosialurin - 311820




# Danir virða føroysk ynski

At meginparturin av dønum taka undir við føroyskum fullveldi, heldur Jóannes Eidesgaard prógvar, at danir virða føroyingar. At danir krevja stutta skiftistíð, heldur hann vera úrslit av ógvusliga útspæli landsstýrissins

JOHN JOHANNESSEN

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, heldur tríggjar grundgevingar vera fyri, at triðji hvør dani tekur undir við, at Føroyar fara út úr ríkisfelagsskapinum, eins og vejarakanning í danska blaðnum, Aktuelt, sýndi týsdagin.

Men høvuðsgrundgevingina heldur Jóannes Eidesgaard vera, at danir virða føroyingar og tískil eisini føroysk ynski. Hann heldur, at tá danir fáa at vita, at føroyingar fegnir vilja úr ríkisfelagsskapinum, skulu teir eisini sleppa tað.

Tó hevur formaður Javnaðarfloksins eisini tvær aðrar grundgevingar. Tann fyrra er, at uppleggið, landsstýrið legði fyri donsku stjórnina undir fyrsta samráðigarfundinum, var alt ov ógvusligt og provokerandi.

– Búskaparligi parturin í hesum útspæli legði upp til, at føroyska skuldin til Danmark skal strikast, somuleiðis sum vit skulu halda fram at fáa blokkstuðul frá dønum langa tíð framyvir. Somuleiðis legið uppleggið upp til, at føroyingar skulu varðveita øll verandi rættindi, sjálvt, um vit fara út úr ríkisfelagsskapinum. Hetta hevur sjálvsagt øst danir, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

– Hesi hørðu krøv úr Føroyum hava helst birt upp undir eina øsing millum vanligar danir móti føroyingum, og tí halda teir, at best man vera at sleppa sær av við Føroyar sum skjótast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Triðju orsøkina til, at 77 prosent av dønum halda, at Føroyar skulu sleppa út úr ríkisfelagsskapinum, heldur Jóannes Eidesgaard vera, at vitanargrundarlagi millum vanligar danir um Føroyar og støðu tess í ríkisfelagsskapinum er ov vánaligt.

### Leiðandi spurningur

Jóannes Eidesgaard loyvir sær kortini at ivast í, um veljarakannigin, sum PLS Consult hevur gjørt fyri Aktuelt, gevur ta heilt røttu myndina av, hvat danir halda um ríkisfelagsskapin og Føroyar.

Í kanningini eru 1017 danir spurdir, um teir eru fyri ella ímóti, at Føroyar verða sjálvstøðugar og harvið fara út úr ríkisfelagsskapinum. Henda spurning heldur Jóannes Eidesgaard tað vera sjálvsagt, at danir svara ja til, um teir virða føroyingar. Tað sýnir kanningin eisini, tí 77 prosent svara ja.

Men Jóannes Eidesgaard heldur, at úrslitið hevði verið eitt annað, um danir eisini vórðu spurdir, um teir halda, at ríkisfelagsskapurin eigur at halda fram.

– Varð hesin spurningur settur, eri eg vísur í, at stórur meiriluti av teimum spurdu høvdu svarað ja, sigur formaður Javnaðarfloksins. Hann heldur nevniliga, at vanligir danir halda nógv um ríkisfelagsskapin, hóast teir ikki hugsa um hann dagliga, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard ásannar, at eitt tað er ósamsvar ímillum røðuna hjá danska forsætisráðharranum undir spurnarorðaskiftinum, tá hann segði, at allir danir ynskja, at Føroyar skulu verða verðandi í ríkisfelagsskapinum og úrslitið av veljarakanningini. Men hann heldur kortini, at nakað er um orðini hjá Nyrup. Tað heldur hann, at vit høvdu fingið prógvað, um veljarakanningin eisini spurdi, um danir ynskja ríkisfelagsskapin at halda fram.

### Øsing orsøk til stutta skiftistíð

Veljarakannigin hjá Aktuelt sýnir eisini, hvørja hugsan danir hava um, hvussu long búskaparliga skiftistíðin skal vera, fáa Føroyar fullveldi. Úrslitið er heilt greitt. Danir halda, at føroyingar eiga at fáa eina skiftistíð, ið er fýra ár, eins og danska stjórnin leggur upp til.

Orsøkina til hetta úrslit ivast Jóannes Eidesgaard onga løtu í. Hann er sannførdur um, at krevjandi og harða samráðingarupplegg føroyinga hevur øst danir. Teir halda føroyingar vera kravmiklar og frekar, og tí taka teir undir við danska forsætisráðharranum, ið sigur, at føroyingar ikki skulu hava longri skiftistíð enn trý til fýra ár.

– Eg haldi, at danir føldu uppleggið sum mannminkandi, og tí eru teir vorðnir so harðir móti føroyingum, sigur Jóannes Eidesgaard og ger greitt, at var samráðingaruppleggið eitt sindur siðiligari, er hann vísur í, at bæði stjórnin og danir høvdu tikið undir við einari longri skiftistíð.

– Hatta við stutt skiftistíðini er fyrst og fremst ein spontan reaktión av harða upplegginum, staðfestir formaður Javnaðarfloksins.



*Høvuðsorsøkina til, at danska fólkið tekur undir við fullveldisætlanin, heldur Jóannes Eidesgaard vera virðing*

# Ov lítil tíð at koma í dýpdina

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður harmast um, at ov lítil tíð er setta av til annað umfar av ríkisrættarligu samráðingunum millum Føroyar og Danmark. Fyrsti fundurin verður í forsætismálaráðnum í Keypmannahavn týsdagin 2. mei frá klokkan hálvgum tvey seinnapartin til klokkan níggju á kvøldi. Hetta heldur løgmaður vera alt ov stutta tíð hjá pøtunum til at koma í dýpdina av sáttmálauppskotinum.

– Tað er harmiligt, at vit ikki kunnu koma rættuliga á glið við samráðingunum,



sigur løgmaður, sum til fánýtis hevur roynt at fáa danska forsætisráðharran at seta meira tíð av til fundin.

Trupulleikin hjá Poul Nyrup Rasmussen er, at hann skal til almenna vitjan í Kina beint efir samráðingarfundin, og tí hevur hann ikki møguleika at leingja hann.

Løgmaður sigur seg kortini hava góðar vónir fyri at fáa nakað burtur úr fundinum. Hann vísir á, at landsstýrið hevur fleiri hundrað modell um ymisk sløg av búskaparligum skiftistíðum klár at leggja fyri donsku stjórnina. Men kortini væntar Anfinn Kallsberg, at samráðingarnar fara at verða beinharðar.


TRANSIT PAR-SUCH

NOA NOA

NÓGV NÝTT HEIMKOMIÐ TIL PÁSKA HESA VIKUNA





29 Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99

Sosialurin - 311820